MARKO´03

SØLUSTEVNAN

Í ítróttarhøllini í Runavík leygardagin 6. og sunnudagin 7. desember 2003

HER BYRJA JÓLINI – ÁRSINS SØLUSTEVNA!

UNDIRHALD – JÓLABAKING FYRI BØRN – MÓTASÝNINGAR – FLOGFERÐIR AT VINNA

AWJ Foto ● Berg Motors ● Bixin ● Bókabúðin ● C-C Leður ● C-it ● El-Tænastan ● Ergo Hjálpartól
Events ● Frú S ● Harryson's ● JKH ● Klement Petersen ● La Femme ● Leikabúðin ● Malla ● My Design
Nyzac ● NSÍ ● Pílar & Skot ● Profa Gólv ● Reyni Service ● Skósølan ● Total ● Trend Floor ● Trillan

Sølustevnan er opin leygardagin frá kl. 14 til 22 og sunnudagin frá kl. 15 til 22



Frá Bíbliufelagnum:

Bíbliuútgávur í bókabúðunum

**Menniskjusonurin**



136 síður
**Kr. 150,-**
*Myndasøgan um Menniskjusonin er grundað á tey fýra evangeliini í Nýggja Testamenti. Pætur apostul lænir okkum eygu at síggja tær hjartanemandi og skakandi hendingarnar kring um Jesu lív.*

**Bíblia**



Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður
**Kr. 150,-**
Kápa: Edward Fuglø

**Bíblia í lummastødd**



Stødd 10,5 x 16,4 cm.
1211 síður
**Kr. 225,-**
Í svørtum leðurlíki við dragulási

**Bíblian - teldutøk**



**Kr. 575,-**
Í 3. útgávu eru umframt føroysku Bíbliuútgávan ymsar danskar Bíbliur og Apokýfisku bøkurnar eins og viðmerkingar til nýggjastu donsku umsetingina.

**Nýggja Testamenti sum ljóðbók**



**Kr. 300,-**
Nýggja Testamenti fæst sum ljóðbók bæði á fløgu og á bandi fyri sama prís.

**Bíblia í svørtum leðurlíki við gullskurði**



Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður
**Kr. 250,-**

**Bíblia - Ríkisbíblia og ættarbíblia við stórari skrift**



Stødd 21,5 x 30,4 cm.
Við gullskurði.
1211 síður
**Kr. 600,-**
Myndprýtt hevur hennara hátign Margreta drotning II.

**Bíblian - Úrvalssøgur**



**Kr. 150,-**
Úrvaldir bíbliutekstir til børn og vaksin við 50 hugvekjandi heilsíðumyndum hjá Esben Hanefelt Kristensen.

Bíbliu-útgávan finst eisini á heimasíðuni hjá Bíbliufelagnum
biblia.fo ella bibliufelagid.fo




# Jóannes heiðraður

**Á samkomu hjá Javna fríggjamorgunin varð Jóannes Jakobsen heiðraður av Javna fyri sítt virksemi við at menna menningartarnað**

HEIÐUR

Á samkomu í hølunum hjá Javna var samkoma fríggjadagin. Har varð Jóannes Jakobsen heiðraður fyri tað arbeiðið, hann hevur gjørt fyri at menna tey menningartarnaðu.

Serliga er Jóannes Jakobsen vorðin kendur í Føroyum sum eldsálin aftan fyri M'as Bluesband, sum aftur hava givið fløgu út.

Jóannes er ein av stigtakarunum til orkestrið og hevur trúliga hildið á og ment tær gávur, tey menningartarnaðu hava.

Á samkomuni helt formaðurin í Javna, Malena Arnoldsdóttir, røðu, har hon fagnaði Jóannesi og tók júst M'as Bluesband fram sum eitt herðaklapp til hansara.

Jóannes Jakobsen varð heiðraður við heiðursbrævi.

Fólk hugnaðu sær á samkomuni við práti, gløgg og holukøkum.

**ej**



JAVNI

Jóannes Jakobsen

Sortugrøs og hjálpiról
út av tornu hanga
fagrast eru blómurnar
har ringast er at ganga.

Góði Jóannes.
Við tínum áræði
og sterka vilja, tó milda sinni,
hevur tú ruddað slóð
við at stuðla, og menna
luttakarnar í M´as Blues Band
og gera fólk við menningartarni kend
rúnt alt Føroya land.
Stóra takk fyri.

JAVNI







Henda áttanda og seinasta bókin í røðini viðger bráða endan, sum føroyska virksemið í Grønlandi fekk.

Seinast í sekstiárunum var so kalt og so nógvur ísur í Grønlandi, at lítið var at fáa. Flestu skipini funnu sær aðrar leiðir, og útróðrarmenninir góvust at fara til Grønlands um summarið. Við hesum fór ein serlig vinna í søguna.

Um sama mundið fóru føroyingar undir nýggjar vinnur í Grønlandi. Fyrst varð farið at fiska laks við gørnum og síðan at trola eftir rækjum. Hetta virksemið eydnaðist og kastaði væl av sær, meðan vit enn høvdu rættindi undir Grønlandi. Tá ið Grønland fór upp í Felagsmarknaðin, broyttust okkara møguleikar, og nú vóru rættindi ikki longur eitt mál, ið kundi avgerast millum ríkispartarnar. Longu í 1970 varð umhugsað at steingja støðina í Føroyingahavnini, men hon andi kortini heilt til 1989, tá ið landskassin ikki longur vildi gjalda.

Hetta var formligi endin á einum sera týdningarmiklum skeiði í føroyskari vinnulívs- og samfelagssøgu.

**Jógvan Arge**

299,-

SANSIR 355 355